# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað er ikki nóg mikið, at Robert Mugabe fer frá, tí tað loysir ikki trupulleikarnar í Zimbabwe*

*Thabo Mbeki*

## Ætlaðu at rógva til USA við einari ár



*Kubanararnir høvdu bara eina ár*
*Mynd: Reuters*

Norska farmaskipið "Berge Danuta" tók í gjár 13 fólk av einum báti í meksikanska flógvanum. Tað vísti seg, at fólkini vóru kubanar, og at tey ætlaðu sær til Florida. Tá tað norska skipið kom fram á tey, var báturin 235 fjórðingar úr Kuba, men langt vestan fyri ta ætlaðu kósina.

Skiparin á "Berge Danuta" sigur við NTB, at fólkini høvdu verið 30 samdøgur á sjónum, og at bara ein ár var í bátinum.

## Vil ikki krevja Mugabe frá

**Suðurafrikanski forsetin, Thabo Mbeki, vil ikki taka undir við kravinum um, at Robert Mugabe skal fara frá**



*Thabo Mbeki og Robert Mugabe á afrikanska leiðarafundinum*
*Mynd: Polfoto*

Suðurafrika er tað landið, sum hevur størstu ávirkanina á viðurskiftini í Zimbabwe, og tí hevur ES biðið suðurafrikanska forsetan styðja evropeiska kravið um, at Robert Mugabe skal leggja frá sær, at at Morgan Tsvangirai er tann lógliga valdi forsetin í Zimbabwe.

Men Thabo Mbeki, forseti, vil ikki taka undir við kravinum um, at Mugabe skal fara frá.

-Tað loysir ikki trupulleikarnar í Zimbabwe, at Mugabe fer frá, sigur hann.

Politiskir eygleiðarar í Bruxelles siga við BBC, at svarið frá Thabo Mbeki kemur ES illa við, tí suðurafrikanski forsetin hevur verið mettur sum ein av teimum fáu, sum kann ávirka Mugabe.

Suðurafrikanskir fjølmiðlar vistu í gjár at siga, at suðurafrikanskir diplomatar hava gjørt eitt uppskot um, hvussu tann politiska kreppan í grannalandinum kann loysast. Eftir henni kann Robert Mugabe halda fram sum forseti, og Morgan Tsvangirai verður forsætisráðharri.

## Mótmæla oljuprísinum

Fleiri hundrað bretskir lastbilaeigarar ætla sær at koyra til miðbýin í London, har teir ætla at parkera uttan fyri parlamentið fyri at vísa sína misnøgd við tann høga oljuprísin. Lastbilaeigararnir fáa fullan stuðul frá sínum bilstjórum, sum stúra fyri at missa arbeiðið orsakað av tí høga oljuprísinum. Bæði lastbilaeigararnir og teirra bilstjórar vilja hava stjórnina at skarva av avgjøldunum fyri at fáa oljuprísin niður.

### STUTT SAGT

### Ófriður í Mongolia

Minst fýra fólk hava latið lív í samanbrestum í mongolska høvuðsstaðnum Ulan Bator teir seinastu dagarnar. Samanbrestirnir hava verið ímillum løgregluna og mótmælisfólk, og tíðindastovurnar skriva, at minst 130 fólk hava fingið skaða, og at fleiri hundrað mótmælisfólk eru sett í varðhald. Mongolska stjórnin hevur lýst landið í undantaksstøðu, og í morgun vóru fleiri av høvuðsvegunum í høvuðsstaðnum stongdir. Val var í Mongolia sunnudagin, og sambært almennu valnevndini vann stjóirnarflokkurin tryggan sigur. Tað vil andstøðan ikki góðtaka.



*Ófriðurin í Mongolia hevur kravt minst fýra mannalív*
*Mynd: AP*

### Hartar Sarkozy

Handilskommiserurin hjá ES, Peter Mandelson, er í øðini inn á franska forsetan, Nicolas Sarkozy. Franski forsetin, sum júst hevur tikið við sum formaður í ES, hevur sagt, at hann heldur lítið um ætlanina hjá Mandelson at lækka stuðulin til landbúnaðin í ES-londunum og at beina toll og avgjøld á landbúnaðarvørum burtur. Sarkozy sigur, at verða ætlaninar hjá kommiserinum settar í verk, fer tað at gera enda á landbúnaðinum í teimum flestu ES-londunum. Peter Mandelson hevur svarað, at tað er hann, sum er kommiserur í landbúnaðarmálum og ikki Sarkozy.